Heimastýrislógin – ein frumskógarlóg á prenti

Tað sum hendi eftir 6. oktober 1992 var bert enn ein staðfesting av tí politiska veruleikanum undir Heimastýrislógini: Hon er eitt tómt hylki, sum ongi mørk setur og ongi rættindi tryggjar. Tað einasta hon hevur tryggjað, er at tann sterkari vinnur á tí veikara – bæði innanhýsis í Føroyum og tá ið donsk áhugamál skulu røkjast.

Heimastýrislógin er sostatt ein nútímans frumskógarlóg á prenti.

»Ein fyrimyndarlig skipan fyri minnilutabólkar innan sama ríki.« – Soleiðis hava danir mótvegis umheiminum ernir lýst heimastýrisskipanina.

»Eitt javnbjóðis samstarv millum bróðratjóðir.« – Soleiðis hava teir politisku bólkar í Føroyum, ið halda fast um ríkisfelagsskapin, marknaðarført Heimastýrislógina.

»Ein mannminkandi skipan, kveikt í eini kolonialistiskari níðingsgerð móti fólkarættinum.« – Soleiðis hevur retorikkurin ljóðað á føroyska loysingarvonginum ímóti Heimastýrislógini.

Spyrt tú søgufólk og juridiskar sérfrøðingar, fært tú eisini ýmsar metingar, sum hvør í sínum lagi kunnu verja hesar ýmsu áskoðanir.

Oktoberkollveltingin 1992?

Í kjalarvørrinum á 6. oktober 1992, tá landsstýri og løgting við stuttum skotbrá vórðu noydd at taka av einum tilboði, ið ikki kundi havnast, gjørdust tær ýmsu metingarnar av Heimastýrislógini knappliga ítøkiligur veruleiki aftur. Danir siga framvegis, at teir hjálptu sínum sjálvstøðuga, men óargaliga bróðuri móti skrædli – í góðum heimastýrisanda. Hetta var eisini áskoðanin á føroyska javnaðar- og sambandsvonginum í byrjanini, men síðani er spurningurin vendur til at leggja danir undir ábyrgdarundanstøkking. Og á loysingarvonginum hevur ákæran um danska níðingsgerð fingið nýtt kjøt og blóð.

Millum sérfrøðingar hevur aftur verið kjakast um, hvørt Heimastýrislógin bert er ein fyribils útdelegering av myndugleika frá Fólkatinginum til Heimastýrið, ella um fólkarætturin løgfrøðiliga hevur givið føroyingum endalig rættindi.

Undirritaði kennir seg ikki bundnan at nakrari av teimum traditionellu politisku áskoðanunum á Heimastýrislógina – har er onki nýtt í væntu í mun til støðuna í 1946. Tíansheldur haldi eg tær ógreiðu akademisku metingarnar vera serliga áhugaverdar, uttan so at føroyingar vilja royna eina sak móti dønum í altjóða høpi.

Í roynd og veru haldi eg tað vera oyðileggjandi at stara seg blindan uppá sjálva Heimastýrislógina. Ein løg kann hvørki fáa skuldina fyri alt ilt ella alt gott, og tað finst onki fólkarættarligt rættvísi, sum sveimar onkustaðni í himmalinum. Tað sum eftir mínum tykki hevur týdning er at gera analysur av tí politiska veruleikanum, ið er skaptur undir Heimastýrislógini, og av teirri samfelagsgongd, sum Heimastýrislógin hevur legitimerað. Bert við at gloyma allar romantiskar frasur og bíligan retorikk um heimastýrið, kunnu vit meta um, hvussu tað tóma hylkið – Heimastýrislógin – er fylt út nú í hálva øld. Og bert við at taka støði í teimum veruligu politisku royndunum kunnu vit skapa nýggjar politiskar og rættarligar karmar um føroyskan politikk og fáa greiði á viðurskiftunum við Danmark.

Avgerð og ábyrgd

Forsprákarar fyri Heimastýrislógini hava altíð lagt dent á, at hon bygdi á prinsippið um, at føroyingar yvirtóku avgerðarrætt og ábyrgd av ávísum málsøkjum eftir egnum ynski. Tann sum vildi valda mátti eisini gjalda, og avgerð og ábyrgd skuldu tengjast saman.

Eftir 6. oktober 1992 kunnu vit slá fast, at hetta hevur yvirhøvur onki við veruleikan at gera. Sjúrður Skaale hevur gjørt eina sera rámandi meting í eini grein í Sosialinum. Hann vísir á, at eftir bankakreppuna hava danir við sínum krøvum lagt seg út í øll tey økir, sum føroyingar formelt hava yvirtikið: Fiskivinnumál, skattamál, vinnumál, sosialmál o.s.fr. Og hinvegin hava teir látið føroyingar goldið og tikið ábyrgd av einum málsøki, sum ikki er yvirtikið, nevniliga banka- og peningamál.

So einfalt er tað, og tað er hent uttan at eitt komma er flutt í Heimastýrislógini. Hetta er sostatt bert tað fullkomna dømið um, at Heimastýrislógin ikki tryggjar nøkur rættindi og hon setur heldur ongi mørk fyri, hvat ber til og ikki. Tann sterkasti vinnur, tá hann vil.

Undirgrundin eitt skúladømi

Ráevni í undirgrundini hevur verið eitt mál, sum hevur ligið í buktini á Heimastýrislógini í mong ár. Eitt felagsmál (A-mál), sum ein meiriluti á løgtingi hevur viljað yvirtikið sum sermál, men danir hava noktað blankt. »Der er ikki noget at rafle om«, segði Anker Jørgensen og sama svar gav hann grønlendingum. Løgfrøðisliga hava danir ført fram, at sambært Grundlógini kann ognarrætturin til ein part av ríkinum ikki latast einum ávísum bólki av ríkisborgarum.

Vit vita øll, at í veruleikanum er hetta nakað tvætl. Ein lítil bólkur av føroyingum hevur ognað sær virðini av okkara tilfeingi – bæði á sjógvi og landi – fyrr sum nú. Og Ein lítil bólkur av donskum ríkisborgarum í teimum privatu risafyritøkunum, situr í veruleikanum á einum stórum parti av virðunum í Ríkinum, uttan at nakar hevur verið eftir teimum við Grundlógini.

Teir sita eisini í veruleikanum longu á (møguligu) virðunum í føroysku undirgrundini – við vælsignilsi frá Heimastýrislógini. Hvussu bar tað til?

Jú, í september '92 hálsaðu danir knappliga um og lótu Føroyingar yvirtaka umsitingina av ráevnum í undirgrundini. Nú bar knappliga væl til løgfrøðisliga og orsøkin er sera einføld, tá vit hugsa um tey realpolitisku áhugamálini hjá dønum:

- Teir vistu longu tá, at eitt fíggjarligt skrædl skuldi takast í Føroyum, donsk áhugamál skuldu bjargast og føroyska heimastýrið setast undir umsiting.
- Teir vistu longu tá, at tað einasta sum kundi geva stórar inntøkur til Statin og til danskar fyritøkur var møgulig olja og gass í undirgrundini.
- Teir vistu longu tá, at um danir av sínum eintingum fóru at geva donskum og útlendskum fyritøkum rætt at leita eftir olju í Føroyum, so hevði verið ramaskriggj í Føroyum – serliga eftir donsku uppileggingina í kreppuna. Danska stjórnin hevði kunnað verið løgd undir nýkolonialismu í altjóða samfelagnum, og tað tolir danska sjálvsmyndin als ikki (onnur lond høvdu neyvan himprast so).
- Tí var tað einasta rætta, at láta føroyingar sjálvar yvirtaka málsøkið og bara tryggja sær, at danskar fyritøkur fingu framíhjárættindi.
- Ætlanin riggaði til fulnar. Føroyingar vórðu ovfarnir av donsku »gávuni«. Føroyingar stovnaðu egna Oljufyrisiting, sum síðani bert hevur verið ein forlongdur armur hjá donskum stovnum og fyritøkum. Gongd er komin á leitingarnar. Allar inntøkur og tann veruliga stýringin eru higartil farnar til danskar fyritøkur (DONG/DOPAS/DANOP/MÆRSK). Verður olja funnin, hava hesar fyritøkur longu ein stóran fyrimun, og landskassans inntøkur eru sambært avtalunum við stjórnina oyramerktar til at gjalda dønum skuld ella minka blokkstuðulin.

➜

aðalmál er loysing, ikki klárar at geva eitt realistiskt svar uppá, hvussu vit loysa, so sita fólk sjálvandi eftir við kensluni av, at har *er* einki svar. Veljarin vil hava økonomiskar og praktiskar realitetir. Tjóðveldisflokkurin hevur givið honum romantiska tokutalu og innantóm slagorð um „loysing í morgin".

Hetta er ikki bara ov lítið til at skapa eitt fólkakrav um loysing – tað er eisini ov lítið til yvirhøvur at yvirliva politiskt. Tí hevur flokkurin í nógv ár tryggjað sær stuðul við agitatión um vanlig gerandismál. Akkurat sum hinir flokkarnir. Hann hevur eisini stillað upp til fólkatingsval. Hann er blivin ein integreraður partur av heimastýrisskipanini.

Kravið um loysing er køvt í pragmatiskum heimastýrispolitikki. Av Tjóðveldisflokkinum!

Illusiónin er burtur

Tann kenslan av at ráða í egnum landi, sum hevur gjørt, at vit hava góðtikið heimastýrislógina, er horvin nú. Tað stóra kalda borðið er tómt. Landsstýrið er so ofta bankað upp á pláss av donsku stjórnini, at illusiónin um sjálvræði er burtur.

Men føroyingar kenna seg framvegis sum serstaka tjóð, mentanarliga sæð. Tí kenst tað sum ein eyðmýking, tá danska stjórnin tekur føroyskar myndugleikar av ræði. Vit kunnu ikki liva við tí. Tann tjóðskaparligi stoltleikin tolir tað ikki.

Reint praktiskt er tað eisini neyðugt, at vit fáa greiðari linjur. Gongdin farnu árini hevur t.d. greitt víst, at vit ikki kunnu hava føroyskar bankar og danskt fíggjareftirlit. At Danmark verður alt meira integrerað í ES fer eisini at krevja eina greiðari statsrættarliga definitión av Føroyum.

Burtursæð frá Sambandsflokkinum duga allir okkara politisku flokkar at síggja hetta. Sjálvt Javnaðarflokkurin, sum altíð hevur hálovað heimastýrislógini, tosar nú um, at vit skulu hava eina „sjálvstýrislóg". Fólkaflokkurin sigur tað sama.

Men enn er hetta bara eitt tómt heiti. Spurningurin um, hvat lógin skal innihalda, verður størsta politiska mál í Føroyum komandi árini. Og alt bendir á, at støðutakanin hjá hesum báðum flokkunum – Javnaðar- og Fólkaflokkinum – fer at verða avgerandi. Tjóðveldisflokkurin vil jú framvegis bara hava loysing – og tí fær hann neyvan meiriluta fyri. Og Sambandsflokksins avnoktan av veruleikanum og nostalgiski longsul eftir fortíðini er ikki tilfar, sum framtíðin kann byggjast á.

Føroyingurin skal hava nýtt andlit

Juridiskt sæð er „føroyingurin" 48 ára gamal. Hann bleiv tann 23. mars 1948 í fólkatingslóg nr. 137 defineraður sum ein, ið „har dansk statsborgerret og er hjemmehørende på Færøerne".

Tá nú okkara statsrættarliga støða aftur kemur til viðgerðar, má hetta broytast. Ella *justerast*, rættari sagt. *Rættast*. Tí hetta er ikki ein definitión, sum føroyingar kenna seg aftur í. Mentanarliga eru vit ikki bara danir, sum „hoyra heima" í Føroyum.

Demokratisk løggáva skal endurspegla tann samfelagsliga veruleikan. Hon skal skipa viðurskiftini millum menniskju soleiðis, sum tey vilja hava tey skipað. Tí skal tann politiska viðgerðin av okkara statsrættarligu støðu m.a. hava til endamáls at fáa samsvar millum tann juridiska og tann mentanarliga – tann *veruliga* – føroyingin.

Ein spennandi og týdningarmikil politiskur dystur stendur fyri framman. Tað hevur skund at fáa hann avgjørdan. Trupulleikin er, at luttakararnir ikki hava gjørt seg til reiðar enn.

- Høvdu danir ikki latið okkum umsita undirgrundina í 1992, so hevði onki verið hent á økinum enn, og danir høvdu riskerað, at politiskar broytingar – antin í Ríkisfelagsskapinum ella í ES – høvdu latið portrið aftur til føroysku undirgrundina. Nú kunnu danir taka tað róligt. Teir hava fingið fótin fastan í føroysku undirgrundina – og hava meira reelt vald, enn tá teir sjálvir umsótu málsøkið.

Undirgrundin er sostatt eitt skúladømi um, hvussu verulig politisk og búskaparlig áhugamál kunnu brúka Heimastýrislógina júst sum teimum lystir – uttan mun til turra løgfrøði og fólkarættarlig idealir.

Spurningurin er bara, um tað er nakað nýtt, sum hendi í 1992. Fyri at meta um tað, noyðast vit at hyggja at søguni hjá Heimastýrislógini við realpolitiskum brillum.

Broytingar uttan semju

Støðan í Føroyum eftir annan heimsbardaga var sum so rættiliga greið. Føroyska samfelagið var longu fyri kriggið farið undir stórbroytingar, bæði vinnuliga, búskaparliga og sosialt. Og eftir 5 ár uttan danska uppilegging, var tað eitt greitt ynski hjá nærum øllum leiðandi samfelagsbólkum at fremja politiskar broytingar – men ongin ynskti fullkomna loysing. At Sambandsflokkurin mutaði ímóti broytingum yvirhøvur, var ivaleyst seinasta sprellið hjá teimum gomlu reiðarunum og handilsmonnum í størru bygdunum, sum enn sóu ein fyrimun í at halda status quo og sleppa undan skatti.

Mentunarstríðið, sum hevði myndað føroyskan politikk síðani tjóðskaparrørsluna, var formliga liðugt. Føroyskt mál hevði fingið innivist í skúla og kirkju og flaggið var viðurkent. Eftir stóð eitt politiskt stríð um at skipa eitt samfelag, ið kundi skapa grundarlagið undir eini nútímans føroyskari mentan. Men her var als ongin semja millum politisku flokkarnar og áhugabólkarnar í Føroyum.

Støðan í Danmark var eisini rættiliga greið. Danir vildu framvegis varðveita síni gomlu hjálond og ikki spæla sær av við ráevnismøguleikar og stórpolitiskar fyrimunir í tí gamla ríkinum. Trupulleikin var bert, at hjálandapolitikkur var fyri stórbroytingum, og um danir ikki ansaðu sær, kundu teir vænta sær fordøming frá tí altjóða felagsskapinum (Fólkasambandið og seinni ST), ið hevði tikið seg upp í kjalarvørrinum á heimsbardaganum. Teir vóru tískil eisini tilreiðar at gera broytingar.

Hetta var støðan, tá ið samráðingarnar byrjaðu í Keypmannahavn í 1946 millum føroysku sendinevndina og donsku stjórnina um framtíðarviðurskiftini millum Føroyar og Danmark.



Hvør fekk í veruleikanum valdið á ráevnum í undirgrundini, tá føroyingar yvirtóku málsøkið?

Seráhugamálini

Uppleggið hjá dønum var heilt greitt. Teir vildu geva føroyingum mentunarliga viðurkenning og geva føroyingum størri statsstuðul, men annars skuldu politisku viðurskiftini verða óbroytt frá amtstíðini. Danir høvdu – tá sum nú – onga veruliga fatan av teimum politisku stríðsspurningunum í Føroyum. Danski forsætisráðharrin, Knud Christensen, gjørdist tí eisini rættiliga bilsin, tá hann møtti eini føroyskari sendinevnd, ið als ikki var samd um nakað krav. Hann hevði trúð, at tað var nóg mikið at geva føroyingum loyvi at brúka síni mentunarligu symbolir: Málið, flaggið og føroyskar pengaseðlar – í góðum samsvari við tann »humana« hjálandapolitikkin hjá dønum.

Umboðini fyri teir føroysku flokkarnar í samráðingunum, vóru ikki komin at tosa um mál og mentan, men høvdu hvør síni boð uppá, hvussu eitt nútímans føroyskt samfelag skuldi skipast. Fólkaflokkurin vildi geva einum nýggjum føroyskum vinnulívi frítt rásarúm og fíggingarmøguleikar. Javnaðarflokkurin vildi tryggja sosialar skipanir við hjálp frá donskum skattapengum. Og Sambandsflokkurin vildi fyrst og fremst tryggja, at tað gamla vinnulívið ikki misti fótafestið. Eftir heima í Føroyum, sótu umboðini fyri restirnar av gamla Sjálvstýrisflokkinum, sum nú einsamallur helt fast um tær romantisku mentunarligu frasurnar frá Tjóðskaparrørsluni, hóast veruleikin langt síðani hevði yvirhálað teir.

Hvør bardist fyri sínum seráhugamálum, og ongin hevði nakra greiða meining um statsrættarligar broytingar og grundleggjandi rættindi. Spurningurin um tilknýtið til Danmark varð mett eftir tí fyrimuni, sum hvør flokkur helt seg fáa innanhýsis í Føroyum ev eini nýggjari avtalu.

Neyðsemjan mikla

Tær føroysku ósemjurnar og tey donsku áhugamálini vóru orsøkin til, at fólkaatkvøðan í 1946 varð útskrivað. Danir sóu sær ein fyrimun í teimum føroysku ósemjunum, og vildu hava spurningin um loysing ruddaðan av vegnum einaferð með alla. Teir føroysku flokkarnir sóu eisini fólkaatkvøðuna, sum eitt taktiskt stig á leiðini. Ongin hevði nakað positivt boð uppá, hvat ein loysing kundi bera í sær, og allir væntaðu at samráðingarnar skuldu halda fram, eftir at loysingin varð havnað av veljarunum.

Spurningurin er tí, hvør gjørdist skakkari, tá ið tann tepri meirilutin atkvøddi fyri loysing – danir ella føroyingar?

At danir sendu tingið til hús við so fáum mótmælum, sigur nóg mikið um, at føroyskir og danskir politikarar vóru eins glaðir um, at úrslitið var ógildað.

Eg eri sannførdur um, at tað finst ein avgerandi orsøk til, at ein meiriluti hóast alt atkvøddi fyri loysingini. Á teimum størru plássunum høvdu fólk fingið greiðar royndir, ið vístu at tað bar til búskaparliga at loysa frá Danmark. Og húsmøðurnar á bygd gjørdust sannførdar um, at tað bar til búskaparliga og politiskt at standa á egnum beinum. Tann politiski bólkurin, ið seinni stovnaði Tjóðveldisflokkin, ferðaðist kring alt landið við veruligum uppskotum, ið góvu loysingini eitt politiskt innihald uttan romantiskt tokutos ella fíggindamyndir av dønum. Tað var eftir mínum tykki avgerandi fyri úrslitið. Tíverri hevur ongin gjørt tað sama síðani – allarminst Tjóðveldisflokkurin.

Úrslitið gjørdist neyðsemjan um Heimastýrislógina.

Heimastýrislógin hevur verið brúkt til at góðkenna eina meginreglu. Tann sterkasti vinnur tá á stendur

Formur uttan innihald

Heimastýrislógin var frá byrjan eitt tómt hylki. Innihaldið skuldi skapast av tí politisku gongdini í Føroyum – bert donsk áhugamál ikki vórðu gingin ov nær.

So við og við fóru teir føroysku flokkarnir at laga seg til møguleikarnar í tí nýggja skipanini. Samfelagið kundi útbyggjast við donskum statsstuðli. Vinnulívið kundi útbyggjast og nýggir marknaðir røkkast. Eitt føroyskt vælferðarsamfelag tók dik á seg.

Fyrst í 70-unum stóð greitt, at ein realpolitisk javnvág hevði tikið seg upp millum føroysku flokkarnar, har allir fingu røkt síni áhugamál: Javnaðarflokkurin fekk eina nútímans vælferðarskipan við donskum statsstuðli. Afturfyri kundi Fólkaflokkurin brúka ein stóran part av teimum føroysku skattakrónunum til at stuðla privata vinnulívinum. Hesum kundi Sambandsflokkurin eisini taka undir við, og hann hevði samstundis varðveitt eitt kanska enn størri tilknýti til danska samfelagið enn í amtstíðini – við danskari útbúgvingarskipan, donskum loysnum í allari nútímans útbygging og donskum gjaldoyra. Tjóðveldisflokkurin fekk nakrar heilar og hálvar yvirtøkur, og kundi upp undir val og á landsins merkisdøgum halda fram við nationalromantiskari agitatión.

Og tá samanum kom, vóru tað lokalpolitisk og privatøkonomisk áhugamál í teimum ymsu flokkunum, ið vóru avgerandi fyri tær politisku avgerðirnar.

Heimastýrislógin var so liðilig, at hon loyvdi Føroyingum at víðka fiskimarkið og umsita sítt egna tilfeingi. Hon loyvdi okkum at siga nei til EEC, at prenta egin frímerki og at spæla altjóða fótbólt. Og hon loyvdi okkum at fara út at spæla við á altjóða fíggjarmarknaðinum, uttan at vit merktu nakrar avleiðingar í fyrsta umfari.

Men hon tryggjaði okkum onki, tá á stóð.

Innihald uttan form

So leingi tann búskaparligi vøksturin helt á, setti ongin spurnartekin við nútímans føroyska samfelagið undir Heimastýrislógini.

Tó so. Fleiri dømi vóru um, at Heimastýrislógin var ein frumskógarlóg, tá verulig stríðsmál tóku seg upp. Klaksvíksstríðið vísti, at tað føroyska samfelagið hevði ongar lógarkarmar og ongar umsitingarligar karmar, ið kundu loysa grundleggjandi ósemjur, og tíansheldur tryggja minnilutabólkum nøkur rættindi. Meirilutin av klaksvíkingum vildu hvørki stýrast úr Havn, úr Keypmannahavn, ella av altvaldandi vinnulívsmonnum í bygdini. Úrslitið gjørdist ein vápnaður bardagi, har teir frammanundan sterkastu vunnu tá samanum kom.

Útróðrarverkfallið í 70'unum prógvaði tað sama: Tær sterkastu vinnulívskreftirnar vunnu við politiskum vælsignilsi. Ongi amboð vóru til at tryggja

nøkur rættindi hjá tí veikara. Stríðsmálini vórðu innibyrgd, og koma tiskil uppaftur við jøvnum millumbilum, tá umstøðurnar skvampa lokið av tí prutlandi pottinum.

Tá leið út á 80'ini stóð greitt, at Heimastýrið hevði fingið eitt realpolitiskt innihald, men tað hevði ongan form og ongi amboð. Í veruleikanum valdaði fullkomin ruðuleiki á øllum økjum í samfelagnum. Avleiðingarnar av hesum merktust ikki rættiliga fyrrenn í 80'unum og 90'unum.

– Búskapurin gekk amokk – vit høvdu onga ábyrgd og ongi amboð at stýra.

– Fíggjarheimurin gekk amokk – vit høvdu onga ábyrgd og ongi amboð at stýra.

– Spekulatiónin gekk amokk – vit høvdu eina danska rættarskipan, sum enn ikki hevur megnað at staðfest nakra greiða ábyrgd og avleiðingar í til dømis skipamálunum. Tað danska dømandi valdið kastar frá sær, tá teir skulu døma við grundarlagi í føroyskum løgum.

Alt ber til við snildi

Tað var neyvan við góðum tannabiti, at danir eisini fóru at brúka tað liðiligu Heimastýrislógina til at bjarga sínum í 1992. Føroyar vóru knappliga vorðnar ein trupulleiki fyri teirra búskap og teirra vitleysu fíggingarstovnar, og teir noyddust at røkja síni áhugamál.

Uttan storvegis hinpr, kundu danir brúka alla sína umsiting og sínar eftirlitsstovnar til at láta føroyska skattaborgaran sita eftir við rokningini fyri alla vinnulívs- og fíggingarspekulatión í Føroyum. So ornana, at vit aldrin hava megnað at stýrt teimum oyðandi vinnulívs- og fíggingarkreftunum í Føroyum, stóðu vit nú í eini tragikomiskari støðu. Tað danska peningavaldið fekk hjálp frá teimum Ríkisstovnunum, ið annars skulu hava eftirlit við og bøta um tær oyðandi kreftirnar hjá sama peningavaldi. Tað svarar nærum til, at italienska mafian, politikarar og løgreglan leggja ráð saman móti einum gøtuseljara, ið ikki hevur dugað sær høgv, og ikki fær goldið lánini aftur.

Og teir hava samstundis tryggjað sær inntøkurnar av møguligum ræevnum í undirgrundini. Teir fingu góða hjálp frá føroyskum politikarum, sum glaðbeintir vildu bjarga bankunum fyri aftur at tryggja teimum sterkastu føroyingunum sínar ognir.

Høvuðstelvarin í hesum leiki var Føroyabólkurin hjá donsku stjórnini, ið sameindi øll donsk áhugamál. Og høvuðsamboðið var Fíggingargrunnurin frá 1992, sum varð settur at arbeiða mitt í tí rættarliga ongamannalandinum millum Føroyar og Danmark, og framdi ætlanirnar í verki. Her vóru ongar lógir, ongar reglur og onki eftirlit við teimum avgerðum, ið avgjørdu lagnuna hjá túsundtals føroyingum.

Demokrati og rættartrygd? Ja, tað gjørdist nú ikki ein býur í Russlandi, men ein adressa í Tjóðbankanum ella eitt telefax í Statsministeriinum.

Hetta kunnu vit í dag staðfesta, men spurningurin er, um danskir ella føroyskir avgerðartakarar nakrantíð kunnu ábyrgdast fyri hesar gerðir. At danir hava lagt seg út í yvirtikin sermál og hava slept sær undan ábyrgd av felagsmálum er greitt. Men trupulleikin er aftur, at vit hava ongar karmar og onki grundarlag, sum tryggjar nøkur rættindi, tá slíkt hendir. Hvar kunnu vit kæra? Hvør vil lurta? Einasti møguleikin er helst at fara til altjóða samfelagið við ákærum um nýkolonialismu, men hvat hjálpir tað nú?

Fyri tey, sum veruliga hava merkt svíðan av bjargingarætlanini er tað ivaleyst longu ov seint. Hundraðtals húski eru rýmd frá húsi og heimi við eini risaskuld. At metingarnar hjá Fíggjareftirlitinum vóru politiskt bilagdar og órealistiskar, vita vit nú. Men hvørjar avleiðingar fær tað?

Kanska er tað svartskygt, men eg eri sannførdur um, at tann danska rættarskipanin fer heldur ikki at megna at staðfesta nakra ábyrgd, tá avleiðingar skulu takast av bankakanningini. Tað verður skipamálini umaftur. Tað føroyska samfelagið er eftir øllum at døma so »serstakt« í danska ríkinum, at ongar lógir og reglur kunnu brúkast. Vit eru rættarliga í ongamannalandi, tá viðurskifti millum Føroyar og Ríkisstovnar skulu viðgerast.

Føroyar – eitt nútímans koloniland

50 ár eftir fólkaatkvøðuna og 90 ár eftir fyrsta politiska flokksbýtið í 1906, standa vit í dag í eini djevulskari støðu. Á pappírinum hava vit gjørt politisk framstig, sum ein »sjálvstýrandi partur av danska ríkinum«. Í veruleikanum hava vit ongantíð verið so gott koloniland sum nú. Tí eyðkennið fyri eitt koloniland er, at onkur annar tekur øll virðini úr landinum, til gagns fyri stórfyritøkur og kanska ein lítlan bólk av innføddum.

Meginpartin av øllum virðum í Føroyum flyta vit so at siga sjálvboðin av landinum. Okkara nútímans vinnulív er uppbygt av dýrum trolarum og flakamaskinum, sum vit keyptu aðrastaðni. Rokningina fyri tey oyðandi tólini rindar tann føroyski skattgjaldarin í dag niður á meginlandið. Afturfyri flytur tað sama vinnulívið nærum alla okkara rávøru óviðgjørda niður til tey somu londini, sum seldu okkum maskinurnar. Restina av okkara inntøku brúka vit til at gjalda rentur og avdráttir til altjóða fíggjarheimin, har slipsaklæddir smádreingir enn stýra tí sirkussinum, sum vit sjálvi glaðbeint valdu at luttaka í. Og gerast vónirnar um olju í undirgrundini veruleiki, fara eisini tey virðini beinleiðis til multinationalar stórfyritøkur ella í danskar kassar, meðan eitt slóð kanska liggur eftir í lummunum hjá onkrum smørtum føroyingi.

Formur og innihald

Skulu vit aftur fáa fótafesti, er tað greitt at broytingar skulu gerast í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Tann politiska gongdin í Føroyum er eisini longu í ferð við at fyrireika broytingar. Men tað loysir í sær sjálvum ongar trupulleikar. Broytingarnar skulu fyrst og fremst gerast her hjá okkum sjálvum. Fara vit aftur at royna at finna eina neyðsemju millum nakrar politiskar flokkar, ið nú hava mist alla sína meining og sín legitimitet, er onki vunnið síðani 1946.

Ein fólkaatkvøða í dag hevði heldur ikki loyst nakran trupulleika. Tí hvat skulu vit atkvøða um? Eina grundlóg, sum ivaleyst bert hevði verið avrit av teirri íslendsku ella donsku?

Einasta loysnin er at gera eina veruliga, breiða politiska semju í Føroyum. At savna ein tvørpolitiskan bólk, ið kann semjast um at geva føroyska samfelagnum eitt minstamark av politiskum innihaldi. Og síðani at geva tí ein veruligan rættarligan form, ið samsvarar við tann politiska veruleikan, og sum tryggjar nøkur grundleggjandi mørk og rættindi.

Høvuðsevnini sum skulu viðgerast politiskt eru:

- Rætturin til tilfeingið á sjógvi og landi
- Umhvørvisvernd og tøkni
- Politiska valdsbýtið – herundir býtið millum land, økir og kommunur
- Almenna umsitingin – herundir stýringsamboð, uppgávubýti og innlit
- Rættarskipan
- Almanna- og heilsumál – minstamark og grundleggjandi rættindir borgarans
- Búskaparmál – herundir stýringsamboð
- Peningamál – herundir gjaldoyra og stýringsamboð
- Vinnulív – herundir samstarv millum alment og privat, ognarrættur, økismenning o.t.
- Útbúgvingarmál – herundir rættindi til útbúgving, gransking o.t.
- Mentunarmál
- Altjóða samstarv

Tað er burturvið at ynskja sær eina semju um politiskar stevnuskráir á hesum økjum – tað hoyrir tí politiska demokratinum til. Men at seta nøkur minstamørk, ið kunnu avmarka frumskógarlógina mest møguligt er endamálið. Okkara grundlóg má fyrst og fremst tryggja, at tilfeingi, virðir og ognarrætturin í landinum ikki verður latin uppi hendurnar á blindari peningaspekulasjón, sum flytur virðini av landinum ella í fáar føroyskar lummar. Hon má tryggja, at politiska valdið ikki verður miðsavnað í Havn og at tey privatu áhugamálini ikki framvegis ogna sær tað realpolitiska valdið. Hon má tryggja somu rættindi fyri øll til samfelagsins tænastur og felags ogn. Hon má tryggja at beinleiðis umhvørvisskaðilig tøkni ikki sleppur framat í framleiðsluni. Og hon má tryggja eitt nógv meira radikalt alment innlit í bæði politisk, umsitingarlig og peningalig viðurskifti, enn vit kenna frá okkara grannalondum. Tað er einasti hátturin at gera upp við vina- og kenningapolitikk og seráhugamál í longdini.

Kunnu vit semjast um tað, so er tað ein tekniskur/løgfrøðiligur spurningur at gera eina føroyska grundlóg og at endurskoða restina av lógarverkinum.

Fáa vit ikki eina politiska savningarrørslu, ið kann bera Føroyar inn í næstu øld, kunnu vit eins væl siga Heimastýrislógina upp og ístaðin biðja um at fáa hjálandastatus við danskari stýring á øllum økjum. So er í hvussu er samsvar millum form og innihald, og vit eru komin burturúr tí rættarliga ongamannalandinum.

Høgni Hoydal

Fólkatingið, løgtingið og landsstýrið

50 ár eftir samráðingarnar og fólkaatkvøðuna um framtíðarstøðu Føroya kunnu vit staðfesta, at fullkomin ruðuleiki valdar í øllum økjum í føroyska samfelagnum, og í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.